# John B ansar bilun-um



**3 ár**

Í skjótt trý ár hevur John B. Hansen nú verið í starvi hjá løgregluni sum parkeringsvørður í Klaksvíkar Kommunu, og hóast uppgávan ikki altíð er so væl umtókt, dámar honum væl starvið.

1. mai 2008 hevði John B. Hansen sín fyrsta arbeiðsdag hjá løgregluni sum parkeringsvørður í Klaksvíkar Kommunu, og sigast má, at hann í dag er ein partur av býarmyndini, serliga í høvuðsgøtunum, har hann sæst koma slotandi eftir bilum, um teir nú eru rætt parkeraðir.

John B., sum hann aloftast verður nevndur, hevur sostatt verið næstan trý ár í starvinum, og ikki kann sigast annað enn, at parkeringsvanarnir hjá fólki eru sjónliga broyttir tann rætta vegin.

*www.klaksvik.fo*

# Borðið fangaði tá ið hann meldaði

Tað var í einum ordans balli á bygd, at tveir mans fóru at brikslast. Tað endaði í roki, har ein maður varð sligin við knýttum neva í andlitið so at hann small í gólvið og ímeðan hann lá, var hann sligin fleiri ferðir afturat í bringuna við knýttum neva.

Maðurin meldaði, men tá ið tað varð runnið av aftur, angraði hann og ringdi til løgregluna at taka málið aftur.

Men tað varð ov seint. Tá ið harðskapur er meldaður til løgregluna fangar borðið og tískil hittust teir báðir í rættinum í morgun.

Maðurin, sum sló var dømdur 30 dagar í gegl-ið, men av tí, at allir vóru skít og av tí, at maðurin aldrin varð revsaður fyrr, sleppur hann undan at sita dómin, ger hann onki annað revsivert í tvey ár.

Annars verður harðskapur altíð revsaður við fongsulsrevsing, men sum umstøðurnar vóru, slapp hann við eini ávaring, gjørdi dómarin honum greitt.

# Skrímslið torir at klintra høgt upp



**BÓKAÚTGÁVA Sætta bókin í røðini um Stóra Skrímsl og Lítla Skrímsl er nú komin. Vælumtóktu barnabøkurnar eru nú á sjey málum**

Eirikur Lindenskov

*»Høgt uppi í trænum sveiggjar Stóra Skrímsl og sigur frá sínum ævintýrum á vandamikla Skrímslatindi.*

*Niðri undir trænum stendur lítla skrímsl og letst ikki at rœðast hæddir.*

*– Eg tori at klintra upp á Filsnafløtti! reypar hann.*

*– Nær fert tú? spyr Stóra Skrímsl.*

*Eg komi við!«*

Soleiðis byrja sætta skrímslabókin. Bøkurnar eru nú á sjey málum og hava fingið virðislønir og viðurkenningar og frálík ummæli. Stór og smá í mongum londum elska skrímslini bæði, og bøkurnar hava fingið virðislønir og viðurkenningar og frálík ummæli uttanlands.

Og tað er ikki uttan grund, at teimum smáu dáma so væl skrímslini. Onkusvegna hava høvundarnir megnað at viðgera fleiri av teimum evnum, ið upptaka yngru børnini. Í hesari bókini ræðist lítla skrímsl hæddir. Men tað er sjálvandi ikki nakað, man sigur fyri øðrum og slett ikki Stóra Skrímsli, ið torir at klintra øgiliga høgt. Í staðin reypar man sær og sigur seg tora alt møguligt. Málið í bókunum líkst sera nógv barnamálinum. Skrímslini reypa og tosa um at draga svørð og høgga hvød av drekum – júst sum lítil børn gera – kanska serliga dreingir.

Tað eru Rakel Helmsdal, Kalle Guettler og Áslag Jonsdóttir, ið hava skrivað og myndprýtt. Bókin er 34 blaðsíður

*– Tú klintraði upp higar, hóast tú ikki tordi. Tað var djarvt, sigur Stóra Skrímsl við Lítla Skrímsl eftir at hannklintraði upp í træið til Stóra Skrímsl...*

# D-A-D á Summar Festival



**FESTIVALUR Tiltikni danski rockbólkurin, sum hevur ferðast um allan heim við sínum tónleiki, bjóðar ársins rockbrak á Summar Festivalinum**

Eirikur Lindenskov

Skalt tú hava rock við fangandi sangum og ordans pallshowi, so første tú tað neyvan betur her á okkara leiðum, enn frá danska rockbólkinum D-A-D.

D-A-D, sum spældi sínar fyrstu tónar í 1982, er tiltikið fyri sínar live-framførslur, og bólkurin, sum hevur hittað kring Europa, er í stórformi, nú teir koma til Føroya at rista og rocka gestirnar á Summar Festivalinum.

- Vit vildu fegin hava eitt ordiligt rockshow á Summar Festivalinum í ár, og tí hava vit sent boð eftir D-A-D, sum man verða ein tann besti norðurlendski rockbólkurin, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyriskiparunum av Summar Festivalinum.

D-A-D varð stovnað í 1982. Fyrstu tíðina var navnið á bólkinum Disneyland After Dark, men Disneykonsernin hótti við einum sakarmáli, og so skifti bólkurin navn til D-A-D. Veruliga gjøgnumbrotið fekk D-A-D á útgávuni No Fuel Left For The Pilgrims frá 1989, og eitt av stóru hittunum hjá bólkinum, Sleeping My Day Away, er at finna á hesi útgávu, sum eisini varð útgivin í USA. Um hetta mundið var D-A-D nógv frammi kring Europa, og MTV vísti eisini sjónbandsløg hjá bólkinum. Síðani gjøgnumbrotið í 1989 hevur D-A-D givið 7 studiofløgur út, og millum kendastu sangirnar hjá teimum eru Laugh And A Half, Bad Craziness og Something Good.

Framúr á palli

Øll árini hevur D-A-D verið tiltikið sum live-bólkur, teir hava havt framúr framførslur á stórum festivalum, og teir kunnu framvegis lyfta stórar áhoyrarafjøldir við sínum melodiøsa rocktónleiki og lívligu framførslum. Danska tónleikatíðarritið Gaffa skrivaði soleiðis í einum ummæli av framførslu hjá D-A-D á Grøn Koncert í Esbjerg farna summar:

- Tað er D-A-D, og tað er framúrskarandi. Punktum. D-A-D hevði í heyst jubileumskonsert í Hamburg, og tá skrivaði ummælari hjá Gaffa, at hann hevði ongantíð upplivað D-A-D betri enn tað kvøldið. D-A-D spælir á Summar Festivalinum, sum verður hildin í døgunum frá 4. til 6. august.